VIÐMERKINGAR

# Búskaparpolitikkur í 2004 - ógreiðir boðskapir

Reidar Nónfjall



***Landsstýrið hevur nýliga boðað frá, at fremjast skulu sparingar á fíggjar-lógini fyri 2004 uppá 36 mió. kr., svarandi til 1% av samlaðu útreiðslunum. Spurningurin í hesum sambandi er, um vinnan og húsarhald skulu fyri-reika seg búskaparliga uppá m.a. lægri vøkstur, stagnatión, niðurgongd ella kreppu.***

***Tað er týdningarmikið, at landsstýrið ikki fremur búskaparpolitisk tiltøk, sum hava eina aðra ávirkan enn tilætlað og í staðin skunda undir eina kreppu-tilgongd - bara orsaka av vantandi innliti í búskapin, vantandi rætningslinjum og fløktari politiskari leiðslu.***

**Búskaparpolitikkur higartil**

Búskaparpolitisk tiltøk kunnu hava stóra ávirkan á m.a. avleiddar vinnugreinar í Føroyum - handlar, byggifeløg, edv-fyritøkur o.a. Hesar vinnugreinar ganga vanliga út frá rímuligum stabiliteti í búskapinum og ikki, at búskaparliga grundarlagið verður tikið undan teimum frá einum árið til eitt annað.

Tað er ikki líkamikið, hvørji búskaparlig signalir politiska skipanin sendir til vinnuna, almenna sektorin sjálvan og húsarhaldini í hesum landinum. At spara prosentvíst í rakstrinum, skerja íløgur, lækka skattin etc. hevur ymiska ávirkan á búskapin. Nøkur tiltøk, umvegis stýring á fíggjarlógini, hava við sær, at búskapurin veksur og nøkur hava við sær, at búskapurin stendur í stað ella minkar. Nøkur tiltøk kunnu serliga raka vinnuna og í minni mun húsarhaldini o.a. Nøkur tiltøk fáa skjóta ávirkan á búskapin, meðan onnur tiltøk fáa ávirkan uppá longri sikt. Tað er eisini ymisk ávirkan á búskapin ella eitt nú á gjaldsjavnan, um tað almenna sparir lønir ella aðrar rakstrarútreiðslur, ella broytir íløgur ella skattin.

Higartil er trupult at síggja, hvønn búskaparpolitik landsstýrið veruliga førir og ynskir at føra komandi árini - boðskapirnir eru ógreiðir og skiftandi. Landsstýrið hevur latið rakstrarútreiðslurnar hjá landinum vaksa ótálmað seinastu árini, fremur síðan skattalætta og nú skerjingar og td. ikki útreiðslusteðg. Landsstýrið noyðist síðan at hækkað lønirnar á hvørjum árið uttan færri starvsfólk innan tað almenna. Nøkur av tiltøkunum hanga saman, td. skattalætti og skerjingar í útreiðslunum, meðan framhaldandi yvirtøkuútreiðslur og lønarreglueringar og lægri ríkisveiting ikki hongur saman við skattalætta, men hongur saman við sparingar uppá 1% o.a.

Spurningurin er hvørja búskaparliga ávirkan einstøku tiltøkini hava og hvat samlaða úrslitið verður. Hesi tiltøk minna meira um reaktiónseyðkenda leiðslu, tvs. at næstan øll búskaparlig tiltøk taka støði í tí meira stuttsiktaðu akuttu politisku ella búskaparligu støðuni og ikki, hvat er rationelt at arbeiða við uppá longri sikt.

**Komandi búskaparpolitiska tiltak**

Tað er ongin nýhugsan í útspælinum frá landsstýrinum, um prosentvísa skerjingar á fíggjarlógini í 2004. Talan er um eina endurtøku av tiltøkum, sum eru brúkt fyrr - uttan úrslit fyri innihaldið og vavið á almenna sektorinum. Tvørturímóti er hetta slagið av tiltøkum besti møguleikin hjá øllum ábyrgdarhavandi at koma við undanførslum, um at fremja veruligar broytingar innan tað almenna. Tað er heldur ongin motivatión hjá einstøku stovnunum at fremja hetta slag av sparingum - øll verða viðgjørd eins og skulu bera seg eins at.

Skerjingar yvir allan sektorin, sum hesar, verða annars mest brúktar í krepputíðnum, vegna vantandi politiska handlikraft, vegna vantandi innlit í almenna sektorin, herundir vantandi innlit í rationaliseringsmøguleikar. Haraftturat er talan um 1%, sum er lítið í mun til stóra útreiðsluvøksturin seinastu árini og nú støddina á almenna sektorinum. Tiltakið er meira við til at leggja royk yvir teir møguleikar, sum eru fyri at broyta lutfallið millum støddina á almenna og privata sektorinum.

Hesi tiltøk ávirka kanska óneyðugt tær tænastur, sum veruliga tørvur er á og virka væl, ella eiga at styrkjast, meðan allar tær tænastur, sum kanska ikki brúk er fyri, hava nóg mikið av peningi og liva sítt egna lív. Vit kunnu illa hugsa okkum, at ein vinnulig fyritøka fremur skerjingar á øllum virksemiøkjum, eisini teimum, sum framtíðar inntøkurmøguleikar eru fyri - í staðin velur fyritøkan at flyta ella skerja tilfeingi á vónleysum inntøku-økjum og geva nóg mikið av tilfeingi til framtíðar inntøkukeldur.

Við hesum fíggjarliga tiltaki virkar tað eisini sum, at fokus verður tikið burtur frá øðrum neyðugum og munadyggum tiltøkum. Haraftturat kann ein spyrja, hvørji tiltøk verða sett í verk í 2005…. 2008. Tað er nú einaferð soleiðis, at bæði vinna og húsarhald hugsað langtsiktað - 2 til 4 ár og kanska longur. Ein vinnulig fyritøka ger ikki íløgur við einari hóttan um krepputíðir og útfrá, at landið gongur á odda at fráboða hesar kreppu-tíðir. Tað eigur heldur ikki at fráboðast, at "trøini vaksa inn í himmalin", men tað skal finnast ein hóskandi og realistiskur millumvegur.

**Neyðug politisk tiltøk**

Løgtingið og landsstýrið hava seinastu árini víðari útbygt almenna sektorin og hevur góðtikið øktar tænastur og játtað tilhoyrandi øktar útreiðslur, nokta fyri at fremja lægri tænastustøði á ymsu økjunum, sett nýggjar stovnar og tænastur á stovn o.a. Tað er tí bara politiska skipanin, sum hevur ábyrgdina av bygnaðinum og støddini av almenna sektorinum, sum vit hava í dag. Tað er politiska skipanin, sum skal seta út í kortið, hvørjir stovnar landið hevur tørv á, hvat støðið skal verða í virkseminum, hvussu stovnarnir kunnu reka virksemið sítt mest effektivt og bíligast, privatiseringar o.a.

Spurningurin er m.a., hví onki verður nevnt um fylgjandi tiltøk - serliga nú Føroyar skulu gerast búskaparliga sjálvberandi:

- **Bygnaðarbroytingar** (td. samanleggingar og avtøka av óneyðugum stovnum ella funktiónum)
- **Sparikatalog** (ongin hevur nakrantíð sæð og ella hoyrt um innihaldið í hesum, men tað er nevnt ofta)
- **Synergieffekt** (hvørjar organisatoriskar broytingar kunnu tryggja betri, fleiri og bíligari avrik í umsitingini sum heild)
- **Privatiseringar** (ongin veit, hvat hendir, men stórir forvæntingar eru um, at nakað hendir)
- **Lógarbroytingar** (spara pening, men bara tosað um hetta í áravís)
- **Langtíðar rakstrarætlan** (rationaliseringar komandi árini, byrjað í 2004)
- **Langtíðar íløguræltan** (hóskandi býtið av smærri og størri íløgum runt um í landinum og eftir tørvi).

Politiska skipanin hevur brúkt nógvar milliónir krónur at styrkja fíggjarstýringina hjá landinum og hevur í løtuni nóg mikið av stýringaramboðum at taka skilagóðar avgerður útfrá, herundir amboð við roknskapar-upplýsingum um virksemi í almenna sektorinum. Landsstýrið hevur tí eitt gott grundarlag at taka avgerðir um neyðugar tillagingar og menning. Landsins búskapur og møguligar sparingar kunnu ikki seriøst viðgerast uppá nakrar vikur í nov./des. á hvørjum árið, tá fíggjarlógin kemur fyri í tinginum.

**Samanumtikið**

Landsstýrið eigur at gera ítøkjuligar ætlanir um, hvussu almenni sektorurin kann rationaliserast í rakstrinum - øki fyri øki, og brúka nógv meira tey stýringaramboð, sum eru tøk í løtuni. Gevið samfelagnum eina fullfíggjaða fráboðan um málsetningar soleiðis at neyðugar tillagingar verða gjørdar í framtíðini. Í dag eru búskaparligu útspælini ikki nøktandi og ongin veit meira enn nakrar mánaðir fram, einstakir stovnur fáa álagt sparingar o.a.

Um so er, at niðurgongd verður í búskapinum, so eigur landsstýrið í staðin at seta gongd á almennar íløgur, sum mótvirka møguligari kreppu. Tað er neyðugt, at íløgurnar koma heildini í Føroyum til góðar og ikki bara lokalum økjum.

Tað er ikki nóg mikið hjá politisku leiðsluni at brúka sonevndu salami-metoduna til at fremja sparingar. Tað hevur heldur onga ávirkan á stóru heildina at taka einstakar stovnar burturúr og uttan nærri at greiða hesum stovnum frá endamálinum og hvat skal skjerast. Hetta hevur heldur onki við veruliga leiðslu at gera og bara slørar veruligu trupulleikarnar, sum heild.

Landsstýrið eigur at sjónliggera síni mál, um nøkur eru, og hava nógv størri konsekvens í polit-iska arbeiðinum. Politiska leiðslan eigur erliga at greiða frá, hvussu hon ætlar at náa teimum málum, sum sett verða, hvørjar loysnir ætlanin er at velja og hvørjar avleiðingar standast av valdu loysnunum.

Politiska leiðslan kann ikki einasamøll loysa teir trupulleikar, sum samfelagið hevur ella fær, og taka ímóti øllum avbjóðingum. Menningin av samfelagnum kann einans gerast í tøttum samstarvi við vinnuna og borgarar landsins - men fyrst er neyðugt at kenna koyriætlanina komandi árini hjá lands-stýrinum.

Eitt er vist og tað er, at Føroyar verða ikki búskaparliga sjálvberandi við, at landið sparir 1% ella 36 mió. kr. á fíggjarlógini fyri 2004 - og verða tað heldur ikki uttan greið mið og mál komandi árini.

## Hans Berntsen í Føroyum 15.–17. mai 2003

TÍÐINDASKRIV



So koma tey – kendi danski prædikumaðurin Hans Berntsen og kona hansara Inge verða í Føroyum í døgunum 15.-17. mai 2003.

Hans Berntsen og kona hansara Inge fara at tala – og biðja fyri sjúkum. Tey hava verið í Føroyum fleiri ferðir áður og nú kemur so »Volvo-maðurin« aftur hendanvegin í nakrar dagar.

Fyrsta tiltakið verður hóskvøldið 15. mai kl. 20 í auluni í Kommunuskúlanum í Havn. Fríggjadagin 16. mai verða Hans og Inge í Skúlahøllini í Trongisvági kl. 18. Og leygardagin 17. mai verða tey í Skúlahøllini í Trongisvági kl. 20.

Hans & Inge Berntsen ferðast regluliga kring Danmark, har tey tosa og biðja fyri fólki. Nú á páskum vóru tey í Grønlandi – í Nuuk – og tað gekk ikki stillisliga fyri seg. Bara eitt kvøld vóru 1200 fólk møtt upp fyri at lurta og verða biðin fyri – 1200 fólk er umleið 10% av íbúgvunum í grønlendska høvuðsstaðnum.

Hans Berntsen, sum leggur stóran dent á at kunna biðja persónliga fyri fólki, slapp at biðja fyri nógvum fólkum hesar dagarnar í Nuuk – og nógv ivasom gjørdust smílandi. Tey upplivdu persónliga, at bein teirra vuksu til rætta longd, deyv hoyrdu og ein drongur kundi tveita høkjurnar og ganga eftir bøn – og tað størsta plussið – fleiri hundrað fólk vildu gerast kristin.

Nú ber so til at síggja Hans Berntsen in action í Føroyum – so tú, sum lesur hetta tíðindaskrivið – og annars øll, eru vælkomin til eitt ella fleiri av tiltøkunum. Møguleiki verður fyri persónligari forbøn fyri tey, sum ynskja tað.

Hósdagin 15. mai kl. 20: í auluni í Kommunuskúlanum í Havn

Fríggjdagin 16. mai kl. 18: í Skúlahøllini í Trongisvági

Leygardagin 17. mai kl. 20: í Skúlahøllini í Trongisvági

## Jógvan við Keldu nýggjur limur í Norðurlendska Mentanargrunninum

Í samband við bygnaðarbroytingina í Norðurlendska Mentanargrunninum, sum varð framd í fjør, fingu sjálvstýrandi økini í Norðurlandaráðnum hvør sín lim, meðan hini londini hava hvør sínar tveir limir.

Í stýrinum fyri Norðurlendska Mentanargrunnin sita nú 13 limir.

Undan hesi broyting skiftu tey trý sjálvstýrandi økini, Áland, Grønland og Føroyar, triðja hvørt ár limin sínámillum.

Jógvan við Keldu er valdur í stýrið fyri tvey ár. Føroyskur eykalimur er Heðin Mortensen.

Nú í vikuni hevði stýrið fund, har peningajáttanir vóru til viðgerðar. Tríggjar føroyskar verkætlanir vóru viðgjørdar, sum allar fingu pening.

# ítróttur

Nr. 90 • týsdagur • 13. mai 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Nevndarvalið útsett

**Enn er nevndin í Hondbóltssambandin um óbroytt. Nýggjur aðalfundur er ásettur til 24. mai**

AÐALFUNDUR

*Jákup Mørk*

Í hósdagsútgávu okkara skrivaðu vit, at tað ivaleyst fór at verða so, at øll nevndin hjá Hondbóltssambandinum fór at leggja frá sær á aðalfundinum.

Hesin varð hildin leygardagin, men enn eru tað so somu persónar, sum manna nevndina, tó at hetta bert er fyribils skilst.

Talan var nevnliga ikki um nakað uppskot til nýggjar nevndarlimir. Sum skilst, so komst hetta tó ikki av, at tað ikki er gjørligt at fáa fólk til nevndararbeiðið, men heldur tí onkur av teimum, sum ivaleyst verða í uppskoti, vilja hava nakað av eyka tíð at umhugsa støðuna. Aðalfundurin tók tí undir við, at nýggjur fundur verður hildin 24. mai.

**Ongar broytingar**

Annars vóru tvey puntk á skránni. Framløga av roknskapinum, sum vísti eitt positivt úrslit, og so ætlaðar broytingar í kappingarreglunum.

Hetta seinna var eftir uppskoti frá Tjaldri, sum vildi hava, at talið av útlendskum leikarum varð lækkað úr trimum niður í tveir. Í evstu løtu varð hetta uppskotið tó tikið aftur av runavíkingunum, og eru kappingarreglurnar tí óbroyttar komandi árið.

## Jan Djurhuus skal venja mansliðið hjá Kyndli

**Kyndil hevur tryggjað sær 34 ára gamla danan sum venjara hjá besta mansliðnum**

HONDBÓLTUR

*sportal.fo*

Kyndil hevur sett 34 ára gamla danan Jan Djurhuus at venja mansliðið. Avtalan er fyribils galdandi fyri kappingarárið 2003/04

Kyndil hevur verið stak væl nøgt við hópin, sum mannaði manslið felagsins kappingarárið 2002/03, og verður tað tí sami hópur, sum Jan Djurhuus kemur at hava ábyrgdina av. Helst kemur onkur spælari afturat, men er enn ongin endalig avtala gjørd. Umframt skal Jan Djurhuus eisini lata nakrar unglinga- og dreingjaspælarar vera við í venjingini hjá monnunum, sigur Finnur Helmsdal, formaður í Kyndli.

Kyndil arbeiðir fram vegis við at fáa venjara til kvinnurnar, og hvørjar skulu manna kvinnuliðshópin.




FARMAKONOMAR

Apotekið í Havn hevur brúk fyri 2 farmakonomum í eitt ár, at byrja skjótast gjørligt.
Møguleiki er eisini fyri at fáa arbeiði í styttri tíðarskeið.

Vit vænta:
At tær dámar at avgreiða viðskiftafólk
At tú ert álitandi og arbeiðsom
At tú hevur góð samstarvsevni
At tú arbeiðir sjálvstøðugt

Vit bjóða:
Gott arbeiðsumhvørvi
Góðar starvsfelagar
Fjølbroytt arbeiði
Fulltíðarstarv

Løn eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Farmakonomfelagið.

Meiri fæst at vita við at ringja til apotekið á tlf.: 34 11 00 og spyrja eftir Petur Oluf Joensen.

Skrivlig umsókn saman við farmakonomprógvi, CV og møguligum ummælum skulu sendast til:

Tjaldurs Apotek
Postboks 3010
110 Tórshavn